gult30 cyan30 magenta30 svart30



## VIÐMERKINGAR

# STREIKA - SKATTALÆTTI :

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður*



Seinastu lønarsamráðingar og streika vísa, at neyðugt er við skattalætta og príseftirliti.

Ein kann fara 3 ár aftur í tíðina og spyrja, hvat valorrustan tá lovaði.

Jú, Fólkaflokkurin lovaði, at skattalættin uppá 500 milliónir, ið var farin fram undir Sambandssamgonguni frá 94 til 98, seinast við sjómannaskattinum, skuldi halda fram, so allir føroyingar, um teir komu framat, vórðu teir næstu, ið skuldu merkja skattalættan. Veljarin gav teimum av hesi orsøk 8 tingmenn og møguleikan at leiða samgonguna.

3 ár eru nú farin. Føroyingurin hevur ikki sæð nevnivert til skattalætta, undantikið tað, ið andstøðan hevur framprovokerað.

Seinastu 3 árini er reallønin helst minka, so fólk hava minni eftir í sín part, enn áðrenn núsitandi samgonga tók við. Helst tí sum mest skal fyllast upp í loysingarkassan.

Talan er um eina skeiva gongd.

**Skattalætti er neyðugur:**
Streika er nú í landinum. Tað eru røddir bæði fyri og ímóti. Men øll eru samd um, at betri hevði verið, at ongin streika var.

**Skattatrýst:**
Um vit hyggja eftir skattatrýstinum her á landi, so nevndi Karstin Hansen, fíggjarmálaráðharri, eftir seinastu "samráðingar" við danir, at eftir útrokningum hjá T & S, er skattatrýstið hjá føroyingum **hægri** enn í Danmark. T.v.s. at fólk her á landi hava minni eftir, tá avgjald er latið til myndugleikarnar í Føroyum, enn í Danmark - væl at merkja, um lønin er hin sama.

Men tá lønarlagið í Føroyum er lægri enn í Danmark, merkir tað, at reallønin er lægri.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, nevndi ein morgun í ÚF, at t.d. ein trailarakoyrari í DK fekk 200 kr um tíman í løn. Tað saman var galdandi fyri truck og kranaførarar. Í Føroyum fáa hesi fólk uml 90 kr. Tað skal ikki tað stóra roknikynstri til fyri at síggja, at fyri sama arbeiði fær danin eftir skatt útgoldið meira, en føroyingurin fær í tímaløn áðrenn skatt. Nú skal eg ikki siga, at alt í Føroyum skal vera sum í grannalandi okkara. Men vørurnar í Føroyum kosta ofta meira enn í Danmark. So skal arbeiðandi fólki fáa meira pening ímillum hendurnar, so kann tað almenna geva sítt íkast við t.d. at lækka skattin hjá øllum og hækka botnfrádráttin.

**Príseftirlit:**
Samstundis verður, eftir míni hugsan, neyðugt við einum príseftirlitið, ið tryggjar, at vørurnar ikki hækka órímiligt, eins og ein hevur varhuga av er galdandi ídag, hvørja ferð, ið lønarvøkstur er.

Tað tykist sera hugstoytt, at skattalætti av nøkrum bert verður nýttur sum valagn. Tá so somu persónar sita í hægstu sessum, so fáa aðrir skyldina fyri at onki hendir á hesum øki. Samstundis, sum skattgjaldarin veit, at loysingareksperimenti fer at kosta eina so stóra skattahækking, at ongin orkar at bera byrðuna.

**Verri kappingarføri - økt landskassayvirskot:**
Tað er sera harmiligt, og ikki sørt skaðiligt, at ongin skattalætti verður framdur. Nú fer so aftur yvirskot landskassans at økjast við stórum parti av lønarvøkstrinum, ið endar í almennu kassunum. Goldið við niðursettum kappingarføri, ið rakar serliga privatu vinnuna, eins og tann privata, hart.

Ein kann ikki vænta, at núsitandi samgonga viðurkennir, at alt ov høga skatta og avgjaldstrýstið bæði er óneyðugt og skaðiligt fyri okkara land. Sjálvandi fer fíggjarmálaráðharrin aftur at ávísa eitt enn størri yvirskot á landskassaroknskapinum.

Men merkir ikki stóra almenna yvirskotið, eitt tilsvarandi minni yvirskot hjá arbeiðandi føroyinginum og vinnuni?

Minni pening til at seta í verk møguligar nýggjar privatar vinnugreinir?

Higartil kunnu vit bert staðfesta eitt: Skattalættin hjá hesi samgongu var valagn og sápubløðra.

Vit kunnu staðfesta, at okkara skattatrýst smb Karstin Hansen er hægri enn í Danmark - og við lægri lønum er realintøkan nógv lægri enn í Danmark.

So kom nú við skattalættanum. Tað eru vit mangir í andstøðuni, ið vilja taka undir við - eisini tá vit sita í samgongu.

Væntandi er, at skattalættauppskot aftur verða løgt á Føroya Løgting beinanvegin í komandi setu. Í hvussu so er av andstøðuni.

TÍ SKATTURIN ER NEVNILIGA ALT OV HØGUR!

# Aftur í 80-ini

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Kári Petersen skrivaði 1. mai eina grein um at Fullveldisætlan Landsstýrisins ikki hongur saman. Dagin eftir svaraði ein fornermaður varaløgmaður aftur. 6 apríl setti Edmund Joensen skrivligan fyrispurning um sama evni til Løgmann. Løgmaður svaraði 3 mai. Tað sum vit síggja er, at bæði Løgmaður og varaløgmaður brúka somu talvur at svara spurningum við. Men tað er undarligt at teir als ikki siga tað sama. Eru teir ósamdir? Ella vita teir ikki, hvat teir tosa um?

Høgni Hoydal sigur, at landsstýri hevur gjørt útrokningar, sum uttanlandanevndin fekk í samband við viðger av tingmáli nr. 114 um framtíðarstøðu Føroya. Tí sigur hann, at alt er væl kannað út í æsir.

Men við at kanna eftir á heimasíðuni hjá Føroya Løgtingi síggja vit fylgjandi: 13/3 Málið framlagt; 16/3 Málið fær 1. viðgerð; 20/4 2. viðgerð og málið samtykt. Nevndarfundir hava verið 20 og 27/3 og 3, 10,17 og 18/4 Men vit síggja eisini at fíggjarligu útrokningarnar frá Fíggjarmálastýrinum komu 17 og 18 apríl. T.v.s. at Uttanlandanevndin fekk sítt tilfar seinasta dagin undir viðgerðini av málinum. Í talvunum síggja vit eisini, at tær eru gjørdar 16 og 17 Apríl.

Tí má niðurstøðan verða, at tá Høgni Hoydal sigur at Landsstýri hevur gjørt útrokningar, er talan um heilaspuna. Men Høgni er meistari at venda øllum. Bert harmuligt at hann um neyðugt eisini brúkar ivasom argumentir. Trúvirðið av hesum talvum tíður eisini uppá, at røtt dagfesting hevði verið 1. Apríl. (meira um hetta seinni) Trúgv kann flyta fjøll. Men sjálvt Høgni fer at ásanna, at tá fjallið ikki kemur til Høgna, noyðist Høgni til fjallið.

Anfinn Kallsberg sigur um somu tøl, at hetta bert er ein meting av hvat krevst, fyri at javnvág skal verða í Landskassanum. Vit staðfesta sostatt, at meðan Høgni tekur hesar útrokningar sum prógv fyri at Fullveldi hongur saman, sigur Anfinn, at tølini bert eru vegleiðandi og siga, hvat skal til. Eingin grundgeving fylgjur hesum tølum. Tí er hetta at rokna sum leysir pástandir, sum ikki kunnu brúkast til nakað sum helst.

Um svarið hjá Anfinn Kallsberg kunnu vit í stuttum siga, at tað er sum altíð hjá Anfinn Kallsberg, ein slutur fyri ein slatur, sum ikki sigur nakað sum helst, Bert rundar orðingar sum t.d. søguligur miðalvøkstur , sum er søguligur og tí als ikki er nøkur framtíðarmeting. Høgni skuldi heldur samanlíkna Anfinn við Erasmus Montanus.Løgmaður svaraði sostatt, at samgongan hevur ikki gjørt nakrar metingar av búskaparligum avleiðingum av fullveldisætlanini.

Hvørjum løgmanni skulu vit trúgva?

**Ósakligar grundgevingar**
Høgni Hoydal sigur í Sosialinum 2. mai, enn einaferð, at stórt tal av føroyskum búskaparfrøðingum hava verið við til at gjørt útrokningar í Hvítu Bók.. Hetta er rætt. Men Høgni gloymur (sjálvandi við vilja) at nevna, at búskaparfrøðingarnir als ikki eru samdir um tølini. Sambandsflokkurin hevur roynt at fáa onkran búskaparfrøðing til alment at gera kritisktar viðmerkingar til tølini í Hvítu Bók, men ongin vil. Orsøkin er, siga teir, at teir óttast fyri møguligum avleiðingum. (Sí grein hjá Jóhan Petersen) Ei undur í, at vit bert hoyra einvegis propaganda.

Høgni vísur eisini til tvær talvur, sum gjørdar vóru 17. Apríl. Hesar talvur hava einki við útrokningar av framtíðini at gera. Onnur er ein meting av hvat krevst í minsta lagi fyri at javnvág skal verða í 2016. Hetta er tí ein útrokning sum best kann samanberast við tá eitt virki roknar null-punkts umsetning. Tí er tað tað reina tvætl sum Høgni Hoydal sigur um hetta. Høgni hevur rætt og slætt ikki skilt hvat hetta eru fyri tøl.

Hin talvan er ein framskriving, sum er skilaleyst bjartskygd. Her verður rokna við at verðandi búskaparvøkstur fer at halda fram nøkur ár enn. Hetta er púra skilaleyst. Vit keyptu fyri 429 mió meira enn vit seldu fyri seinasta ár. Um vit skulu hava framhaldandi vøkstur, krevst at fiska- og laksaprísir vaksa eins nógv og teir hava higartil. Nei, sjálvt ikki substral og propaganda fáa trøðini at vaksa inn í himmalin. Ein onnur treyt er, at innflutningurin økist við somu ferð sum higartil. Tað letur seg sjálvandi gera við einum fíggjarmálaráðharra, sum sigur seg ansa eftir, men einki ger. Hetta ger, at ein fortreyt fyri fullveldisætlanini er, at handilsjavnin versnar enn meira. Tá blokkurin samstundis minkar verður talan um undirskot á gjaldsjavnanum. Vit tosa um undirskot uppá minst _ milliard. Jú sanniliga nærkast 80 ini.

Viðmerkjast kann um gjaldsjavnan, at vit bert hava fyribilstøl fyri 1998 og eingi almenn tøl fyri 1999 og 2000. Hetta er sjálvandi skilaleyst. Vit vita tí als ikki hvussu stendur til við okkara uttanlandaskuld. Tað gjørdu vit heldur ikki í 1988. Tá vóru eisini pengar í landskassanum og Tjóðveldi umsat fíggjarmál. Hóskandi kunnu vit enda við at siga, at alt tíður uppá, at Føroyar eru væl ávegis Aftur í 80 ini við Tjóðeldisflokkinum. Tað var ein góð tíð. Men aftaná 80 ini koma 90 ini. Livst so spyrst.




gult31 cyan31 magenta31 svart31



**Pedagogar til dagstovnin í Fuglafirði**

1) Søkt verður eftir 1 pedagogi 35 tíma viku, at byrja 01.08.2001. Starvið er á stovu við 10 børnum 0-3 ár.

2) Søkt verður eftir 2 pedagogum 35 tíma viku, at byrja 01.09.2001. Starvið er á stovu við 10 børnum 0-3 ár.

Lønin verður fyribils sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag í 11/13 lønarflokki.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran tlf. 444940/225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 28. mai 2001 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 9. mai 2001
**Fuglafjarðar býráð**

SK
Felagið fyri Skrivstovu-kramba- og teknisk starvsfólk

**Upplýsir um:**
-sáttmálan
-starvsmannalógina
-frítíðarlógina o.a.

**Gerist limir - so standa vit sterkari!**

Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo

Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

Søkt verður eftir fólki til
**NÝTT DANSISTAÐ**
**í Tórshavn**
Hevur tú hug at arbeiða á einum nýggjum dansistaði sum skjótt letur upp í Tórshavn, so er hetta kanska nakað fyri teg. Vit leita eftir barrfólkum, kontrollum og hjálparfólki sum eru eldri enn 18 ár.
Hevur tú hug til nakað nýtt og spennandi, so ring á tel. **221607** eftir kl. 17.



**Stóra bringu**
**-ella lítla?**

**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?**

**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

**HEILAFELAGÐ**
*Felagið fyri apopleksi- og afasirakt*

MBF-húsið, Landavegur 10, Tórshavn

**FRÁ Í DAG OG HVØNN TÝSDAG KL. 18-20 SVARAR TELEFONIN HJÁ FELAGNUM Á TLF. 311520**

Endamál felagsins er:
- At upplýsa um apopleksi og afasi
- At stuðla teimum raktu og teirra avvarandi
- At ráðgeva um almennan stuðul, skeið, frítíð og aðra hjálp
- At betra viðgerðar-, undirvísingar- og uppvenjingarumstøður hjá teimum raktu
- At knýta bond millum fólk í somu støðu
- At luttaka í tjóðskaparligum, rorrønum og altjóða samstarvi

# Starv innan kredittmeting

Søkt verður eftir starvsfólki til kredittdeild okkara

**Uppgávurnar eru:**
- ráðgeving innan kredittøkið til allar deildir v.m.
- útinnan av kredittmetingum; vinnuligt og privat
- roknskaparsundurgreiningar
- lýsing av vinnugreinum
- hagtalsuppgávur
- ad-hoc uppgávur

**Førleikakrøv:**
- HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrift og talu

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt
- vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni

Starvsstaður er Tórshavn. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Boga Bendtsen, undirstjóra, tel. 348 000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 18. mai 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Kredittdeildin,Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: kredittdeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Arbeiðsøkið hjá kredittdeildini fevnir m.a. um ráðgeving av deildum Sparikassans, kredittmeting, vinnugreinalýsingar, uppfylging, roknskapar-, hagtals- og aðrar uppgávur. Í løtuni starvast 8 starvsfólk á kredittdeildini.

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**Framsýning av bátamotorum niðri í Rættará**



PERKINS SABRE M215C
215 hp (158 kW)

Leygardagin 19. mai

**Perkins- & Lombardini -diesel bátamotorar**
**Selva 2 & 4 takt páhengsmotorar**

Framsýningin har motoraranir verða vístir og royndir, verður í Sigmundargøtu 28
(í Rættará beint niðan av sluppini Westvard HO).

Hugsar tú um at skifta- ella ogna tær nýggjan motor, fært tú leygardagin 19. mai 2001 millum kl. 10.00 til 20.00 ein frálíka góðan møguleika, at síggja motorar í drift, og samstundis fáa motorprát við serkøn maskinfólk.

**METRIC**
Maskinverkstaður
Gudmund G. Isfeldt

Perkins

Telefon: 313484
Telefaks: 319984
Mobiltelefon: 213484